## Neyvan størri kvotu

Í summar gjørdi íslendska stjórnin av at skarva triðingin burtur av toskakvotuni, og tað er lítið, sum bendir á, at íslendskir fiskimenn kunnu vænta sær størri kvotu aftur í bræði. Morgunblaðið skrivar, at kanningar hjá havrannsóknarstovninum hava víst, at toskaárgangurin í ár er slakur og einki frægari enn árgangirnar frá 2004 til í fjør, sum vóru heldur vánaligir. Hetta boðar ikki frá góðum, heldur blaðið, sum ikki væntar kvotuhækking tey fyrstu árini.



## Khader gjørt svart arbeiði

Leiðarin í Ny Alliance, Naser Khader, er farin í hernað móti vikublaðnum Se og Hør og ábyrgdarblaðstjóranum, Henrik Qvortrup. Í eini grein í morgin ákærir vikublaðið Se og Hør Khader fyri at hava fingið gjørt svart arbeiði fyri 80.000 krónur í sambandi við bygging av einum garði og einum portri heima hjá sær sjálvum í Keypmanahavn.

# Rodmundur bekennir lit

**Listarnir hjá flokkunum til fólkatingsvalið eru um at vera lidnir. Og eitt av nýggju, kendu nøvnunum er fyrrverandi borgarstjórin í Runavík, Rodmundur Nielsen**

FÓLKATINGSVAL

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Rodmund Nielsen hevur bekent lit og verður at finna á listanum hjá Fólkaflokkinum til fólkatingsvalið*

Fríggjadagin klokkan ellivu skjulu listarnir til fólkatingsvalið latast inn – í seinasta lagi. Og hóast tíðin er rættiliga knøpp, so eru flokkarnir um at verða komnir undir land við uppstillingum teirra.

Sambært formanni Fólkafloksins, Jørgeni Niclasen, verður listin helst endaliga liðugur í dag, og sambært formanninum verða allir ting- og landsstýrismenn floksins við á listanum. Burtursæð frá Anfinn Kallsberg, sum í síðstu viku boðaði frá, at hann ikki fór at stilla upp aftur til fólkatingsvalið.

Annika Olsen hevur longu verið frammi í bløðunum og bjóða seg fram, og hartil váttar Jørgen Niclasen, at Tummas í Garði verður ein av kandidatunum hjá flokkinum.

Fyrr í summar gingu nógvar søgur um, hvar fyrrverandi borgarstjórin í Runavík, Rodmund Nielsen, hoyrdi heima politiskt, og seiglívað slatur plaseraði hann í Sambandsflokkinum. Men nú váttar formaður Fólkafloksins, at Rodmund Nielsen verður at finna á teirra lista til fólkatingsvalið, og hóast tað enn er ov tíðliga at tosa um løgtingsval er tað ógvuliga nærliggjandi at hugsa, at hann somuleiðis verður at finna á tí listanum.

### Javnaður og Tjóðveldi klárt

Sambandsflokkurin er einasti flokkur, sum alment hevur verið frammi við einum fullfíggjaðum lista, og teir hava eisini boðað til tíðindafund í morginárini.

Eisini Sambandið hevur fleiri nýggj nøvn á listanum, og eitt hitt mest spennandi er kanska Ingvør Nolsøe. Men eisini borgarstjórin í Sandavági, Rósa Samuelsen, er eitt nýtt navn á listanum.

Úr javnaðarflokkinum verður sagt, at tey eisini eru nær við at vera klár at almannakunngerða listan, og at tað eftir øllum at døma verður einaferð seinni í dag. Tá vit tosaðu við floksskrivaran í morgun vóru tey kortini ikki klár við nøkrum almennum nøvnum.

Tjólveldi fer á eykaflokstingi í kvøld endaliga at góðkenna fullfíggjaða listan, men fleiri nøvn hava longu verið almannakunngjørd. Sjúrður Skaale hevur verið á listanum áður við góðum úrsliti, og verður við aftur hesaferð. Eitt annað spennandi navn á Tjóðveldislistanum er Bjørt Samuelsen, ið kemur frá einum almennum miðli, nakað sum ofta hildnast væl.

Sum Sosialurin visti at siga frá fyri tíð síðani, verður Kári á Rógvi spísskandidatur hjá Sjálvstýrinum, men annars eydnaðist tað ikki at fáa orðið á umboð fyri smærru flokkarnar, áðrenn evstamark blaðsins. Men einki er at ivast í, at eisini teir eru um at verða lidnir við sínar listar til fólkatingsvalið 13. november.

# Lagnan avgjørd í morgin

**Atkvøðugreiðsla verður í Norðurlandaráðnum í morgin um uppskotið at gera Føroyar til sjálvstøðugan lim**

LIMASKAPUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Høgni Hoydal skal á Norðurlandaráðsfund í morgin, har atkvøðast skal um føroysku umsóknina um sjálvstøðugan limaskap*

Tað var longu í 2003, at Føryar søktu um sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum. Og nú kemur hendan umsóknin endiliga til viðgerðar og atkvøðugreiðslu.

Føroysku umboðini í Norðurlandaráðnum eru Jógvan við Keldu og Kári P. Højgaard, men hartil hevur Høgni Hoydal eisini atgongd til fundirnar gjøgnum sín status sum eykalimur hjá fólkatingsumboðunum.

Høgni Hoydal sigur, at tað er óvist, hvørja lagnu føroyska umsóknin fær, men tað hevur kortini stóran týdning, at nøkur umboð atkvøða fyri, sjálvt um vandi er fyri, at uppskotið fellur.

- Tað, sum hevur týdning, er, at málið ikki bara verður tagt burtur og at enda bara tyrvt. Tað er eitt næstan søguliga samt ting, sum hevur tikið undir við umsóknini, og tí hevði tað verið harmiligt, um málið bara varð tagt burtur, sigur Høgni Hoydal.

Hann vísir á, at tað verður neyðugt at broyta Helsingforssáttmálan, sum er tann instansur, ið regulerar alt norðurlendskt samstarv. Og sum er ber ikki Føroyum til at gerast sjálvstøðugur limur .

- Eg eri limur í sonevnda vinstra grøna bólkinum í Fólkatinginum, og hann vil atkvøða fyri. Eisini hevur danska delegatiónin vátta, at hon vil atkvøða fyri, tó at tað er eitt sindur óvist, hvussu nógvir limir fara til fundin, nú fólkatingsval er útskrivað. Men gera føroysku limirnir í ráðnum sína ávirkan galdandi, skuldi borið til at fingið málið samtykt, sigur Høgni Hoydal.

Men alt hetta verður so avgjørt á Norðurlandaráðsfundinum í morgin.